# Íslendskur risi kannar møguleikarnar í Føroyum

**Hóast Dagsbrún er ein risafyritøka, sum væntandi fer at hava eina sølu upp á ímillum fýra og fimm milliardir í á, halda tey ikki, at Føroyar eru ov smáar**

Íslendska fyritøkan, Dagsbrún, er ein fyritøka, sum er vaksin ómetaliga skjótt.

Virðisbrøvini hækka í hvørjum og tað ger virksemið eisini. Soleiðis hevur Dagsbrún skjótt eina sølu, sum táttar í fimm milliardir krónur.

Fleiri av teirra fyritøkum, hava ment seg til at vera nakrar av teimum størstu í Íslandi á teirra øki.

Men hóast talan er um eina stóra fyritøku, heldur hon ikki, at føroyski marknaðurin er ov lítil at brúka kreftir upp á, hóast vit bara eru sløk 50.000 fólk.

Dagsbrún er longu í Føroyum við tað, at hon eigur telefyritøkuna, Kall, sum er í støðugari menning og sostatt hava teir longu kunnleika til føroyska marknaðin.

– Talan er um eina fyritøka, sum fevnir sera víða innan alt tað økið, sum kann nevnast samskifti, fjarskifti, miðlar og undirhald, sigur Bjarni Askham Bjarnason, stjóri í Kall.

– Men teir hava eisini gjørt íløgur í feløg, sum hava við trygd og ansing at gera, og í løtuni eru teir í ferð við keypa seg inn í eina stóra prentsmiðju í Bretlandi, leggur hann afturat.

Somuleiðis hevur Dagsbrún nýliga keypt meirilutan í KT-fyritøkunu Køgun, sum er ein hin størsta av sínum slagi í øllum Íslandi.

Bjarni Askham Bjarnason sigur, at á ferðini til Føroya í hesi vikuni, ætlar Dagsbrún at kanna eftir, hvørjir samstarvsmøguleikar kunnu vera í Føroyum.

Men teir ætla eisini at eggja føroyingum til at seta partapening í Dagsbrún.

Tey umboð fyri Dagsbrún, sum koma til Føroyar í hesi vikuni, umboða tann partin í samtakinum, sum hevur við tele-com at gera og Bjarni Askham Bjarnason heldur avgjørt, at møguleikar skuldi verið fyri samstarvið við føroyingar innan hetta øki.

Hann sigur, at talan kann vera um at byggja okkurt nýtt upp í Føroyum í samtarvi við onnur og tað kann vera á øllum møguligum økjum innan miðlar, undirhald ella samskifti í breiðastu merking.



*Bjarni Askham Bjarnason, stjóri á KALL*

## FAKTA

**Stutt um Dagsbrún**

Dagsbrún er eitt holdingfelag, sum hevur nógv feløg undir hattinum. Feløg, sum Dagsbrún eigur og øki, virksemið, fevnir um, er

| Felag | Virkisøki |
|---|---|
| OG Vodafone: | Telecom |
| 365: | Útvarp, internet, sjónvarp og bløð |
| Sena: | Biografar, tónleikur, DVD-útleigan o.a. |
| D3: | Tónleikur, filmar o.a. |
| Securitas: | Trygdartænasta |
| Kall: | Telesamskifti |

